Summarkapping
Sosialurin



Puntur nr.11

# Ferðamál: Chinatown, London



*Chinatown er ein multikulturellur býarpartur av London, ið sera mong vitja dagliga. Um kvøldið er serliga hugnaligt at vitja Chinatown, tá m.a. ljósini úr mongu matstovunum í gøtunum eru við til at skapa eitt øðrvísi huglag, enn kann upplivast aðrastaðni í bretska høvuðsstaðnum.*

**Í sambandi við, at Sosialurin í hesi vikuni vitjar stórbýin London og lýsir, hvussu hesin kann upplivast frá einum føroyskum sjónarmiði, setur Torfinnur Jákupsson, ið er lesandi í London, í hesi grein fokus á Chinatown í London**

LONDON
*Torfinnur Jákupsson*

Fert tú út at eta sum føroyingur í London, er Chinatown avgjørt verdur at vitja.

Chinatown er býurin hjá kinesarunum í London, sum heitið ber boð um, og liggur í Soho-partinum av Westminster. Í hesum býarparti er nógv øðrvísi enn í restini av London. Ikki minst er matskráin í mongu matstovunum í gøtunum í Chinatown forkunnug at royna hjá føroyingum.

Chinatown býarpartar eru kendir um allan heim, kanska serliga umvegis Hollywood. Hesir býarpartar vórðu til í 19. øld í mongum pørtum av USA og Kanada, orsakað av landbúnaðarlógum, ið skerdu rættindini hjá kinesarum og øðrum at keypa sær jørð har. Í byrjanini av tjúgundu øld búsettust flestu kinesarar eisini í Chinatown býarpartinum av London.

Chinatown var fyrr m.a. kendur fyri, at tú kundi keypa opium lógliga har, men vóru flestu íbúðarblokkarnir at rokna sum slummir. Í 1934 vórðu hesar slummir niðurbrotnar, og eftir seinna veraldarbardaga komu nógvir kinsesiskir immigrantar úr Hong Kong til Londons m.a. at byrja sína egnu matstovu.

Í dag er umhvørvið meiri fyrikomandi, enn tað var. Tað eru serliga kinsesisku matstovurnar, sum skapa góða huglagið í hesum býarparti av London, sum veruliga tók sítt skap í sjeytiárunum.

Í fjør varð skotið upp av nøkrum íverksetarum í London, at eystari parturin av Chinatown burdi verið umbygdur, men hesum tykjast kinesarar at vera ímóti. Og tað er skilligt. Etnisku eyðkennini við Chinatown eru júst tað, ið gera býarumhvørvið serligt.

Ein av mest vitjaðu matstovunum í Chinatown í London er Wong Kei, ið m.a. er vorðin kend fyri sínar heldur ófyrikomandi tænarar. Heldur lága tænastustøðið verður tó nevniliga roknað sum at mynda part av hugnaligu upplivingini av at fara út at eta í Chinatown, halda bretar, ið eisini meta, at tey, ið borðreiða í Chinatown, eru tó vorðin nakað fittari, enn fyrr.

Men alt er ikki so positivt. Chinatown er ikki eitt stað, har mong fólk búgva. Heldur er lætt at síggja fleiri ólógligar arbeiðarar í Chinatown enn búsetarar, ið somuleiðis vinna minni enn minstu løn við at m.a. tæna har.

Triadurnar, ið gera um seg fleiri staðni runt um í heiminum, sigast eisini at virka í Chinatown. Á Gerrard Street var fyri trimum árum síðani ein skotbardaga í eini barr. Tó eru slíkar hendingar ikki at uppliva ofta, og Chinatown má sigast at vera ein reiðiliga tryggur partur av London.

Summi meta Chinatown at vera eina etniska ghetto, men er vert at vita sum føroyingur, at hetta býarumhvørvið í London umboðar eisini ein miðdepil í bretska høvuðsstaðnum, har sera mong ferðandi vitja. Chinatown umboðar eina multikulturalismu, sum vit ikki kunnu sigast at kenna til í sama mun í føroyska høvuðsstaðnum.




